FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

15. oktober 2021
Mál: 21/20209-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-047/2021

Svar til fyrispurning 52-047/2021 frá Høgna Hoydal, løgtingsmanni, um vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020

Spurningar:

1. Hvussu nógvar umsóknir komu um kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir og ískoytiskvotur í 2020?

2. Vórðu umsóknirnar viðgjørdar í umsitingini og tilmæli gjørd í Fiskimálaráðnum til landsstýrismannin um, hvørjar umsóknir luku treytirnar og eftir fakligari meting áttu at játtast sambært lóg og kunngerð?

3. Hví vórðu ongar játtanir givnar til umsóknir til vinnuligar kvotur og verkætlanir í 2020 – og við hvørjari heimild og skjalfestari grundgeving vórðu kvoturnar ikki játtaðar – meðan ískoytiskvotur kortini vórðu latnar?

4. Um umsóknir vórðu tilmældar frá umsitingini í Fiskimálaráðnum at játta, hvørjar vóru so tær ítøkiligu umsóknirnar, ið ikki vórðu játtaðar kortini?

5. Um svarið er játtandi til spurning 2 og 4, hvør er tann lógliga, sakliga, proporsjónala og líkaregluliga grundgevingin fyri ikki at játta – og hvør er sakliga grundgevingin fyri, at landsstýrismaðurin ístaðin leggur broyting í sjófeingislógini fyri tingið, ið broytir treytirnar fyri at søkja um hesar kvotur?

6. Eru umsóknir frá umsøkjarum, ið ikki vórðu tilmældar fakliga frá umsitingini í 2020, sum ístaðin hava fingið játtan í 2021 eftir broyttu treytunum?

Svar:

Til nr. 1.
Í 2020 komu 38 umsóknir inn viðvíkjandi vinnuligum royndum og verkætlanum, og 16 umsóknir komu inn viðvíkjandi ískoytiskvotum.

Til nr. 2.
Ja, umsóknirnar vórðu viðgjørdar í umsitingini, og tilmæli gjørt til landsstýrismannin.

Til nr. 3.
Orsakirnar, til at ongar játtanir vóru givnar til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020, eru ein samanrenning av fleiri viðurskiftum.

Av tí, at tað var so langt útligið, áðrenn grundarlagið fyri at søkja eftir umsóknum var upp á pláss, var avgerð tikin um ikki at hava svartkjaft sum grundarlag fyri vinnuligum royndum og verkætlanum og ískoytiskvotum í 2020. Hetta tí at væntast kundi ikki, at svartkjafturin fór at verða gagnnýttur í nøktandi mun í 2020, um bíðast skuldi eftir einari drúgvari málsviðgerðartilgongd í sambandi við viðgerð av umsóknunum. Til tess at byrgja fyri, at virði fóru fyri skeyti, og at tryggja, at tey smærru og minni væl útgjørdu skipini kundu fáa lut í atgongdini, var tí lagt upp til í løgtingsmáli 136/2019 at heimilað landsstýrismanninum ístaðin at lata nøgdirnar av svartkjafti út sum felagskvotu við hámarki sambært vanligu reglunum í §§ 22 og 23 í sjófeingislógini. Hesa heimild fekk landsstýrismaðurin, og vórðu svartkjaftakvoturnar avgreiddar á henda hátt.

Viðvíkjandi makreli og norðhavssild varð lýst eftir umsóknum til vinnuligar royndir og verkætlanir umframt ískoytiskvotur við umsóknarfreist 10. august 2020.

Niðurstøða var gjørd viðvíkjandi tilmælum til ískoytiskvotur tann 28. september 2020. Talan er um kvotu, sum verður latin fyri at styrkja um kvotugrundarlagið hjá ávísum fiskifari, og kunnu hesar kvotur tí gagnnýtast beinanvegin. Øðrvísi er við vinnuligum royndum og verkætlanum, har talan ofta er um verkætlanir, sum skulu fyrireikast, áðrenn tær kunnu førast út í lívið.

Viðvíkjandi vinnuligum royndum og verkætlanum lat umsitingin landsstýrismanninum eitt tilmæli. Um tað mundið var longu liðið so væl út á árið, at umrøtt varð, um tað var meira skynsamt at fáa eina heimild frá Løgtinginum at flyta hesar nøgdir yvir ár, og soleiðis geva vinnuligu royndunum og verkætlanunum eitt breiðari og betri grundarlag at byrja á í 2021. Á henda hátt kundi svartkjaftur eisini gerast partur av grundarlagnum, umframt at kvotugrundarlagið til fyrsta árið tá bleiv meiri haldgott, tí talan tá bleiv um kvotur fyri 2020 og 2021.

Eg tók tí avgerð um, heldur enn at játta makrel og norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020, at leggja uppskot fyri Løgtingið (løgtingsmál 69/2020), har biðið var um heimild at flyta kvotur til vinnuligar royndir og verkætlanir frá 2020 til 2021. Hetta varð samtykt í Løgtinginum áðrenn ársskiftið.

Eisini var við uppskotinum lagt upp til, at møguleiki skuldi vera fyri at søkja um kvotu í sambandi við ítøkiligt skipakeyp uttan krav um veiðiloyvi. Tann lógarbroytingin varð tó ikki samtykt í tí umfarinum, men í staðin lagt fram aftur og samtykt tann 29. apríl 2021 (sí løgtingsmál 100/2020).

Til nr. 4.
Eins og greitt er frá til spurning nr. 3, var við lógarbroyting í sjófeingislógini heimild fingin frá Løgtinginum at flyta nøgdirnar til 2021 og harvið m.a. skapa eitt størri kvotugrundarlag

fyri einum nýggjum umsóknarumfari. Landsstýrismaðurin tók tískil onga avgerð um vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020; og tískil varð eingin umsókn játtað í 2020.

Umsitingin viðgjørdi umsóknirnar og gjørdi eina frágreiðing við einum tilmæli til landsstýrismannin. Í frágreiðingini var ein stutt lýsing og meting av øllum umsóknunum. Frágreiðingin frá umsitingini er eitt innanhýsis arbeiðsskjal, sum er gjørt av myndugleikanum til egna nýtslu, sbrt. § 7, nr. 1 í løgtingslóg um innlit í fyrisitingina. Landsstýrismaðurin hevur tó í svari til spurning nr. 6 givið upplýsingar úr frágreiðingini, tó uttan at upplýsa nøvnini á umsøkjarum.

Til nr. 5.
Viðvíkjandi orsøk til ikki at játta umsóknum til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020 verður víst til svar upp á spurning nr. 3.

Sum víst á í svari til spurning nr. 3, var avgerð tikin um ikki at hava svartkjaft sum grundarlag fyri vinnuligum royndum og verkætlanum og ískoytiskvotum í 2020 fyri at tryggja, at virði ikki fóru fyri skeytið. Seinni varð eisini avgjørt at bíða við vinnuligum royndum og verkætlanum fyri makrel og norðhavssild og flyta nøgdirnar til 2021 at verða útlutaðar saman við svartkjaftinum. Metingin var, at hetta fór at tryggja eitt meira haldgott grundarlag hjá vinnuligum royndum og verkætlanum í 2021.

Øll, sum søktu í 2020, hava fingið at vita, at um tey ætlaðu at søkja um kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021, var neyðugt at senda eina nýggja ella dagførda umsókn inn samsvarandi oyðublaðnum.

Viðvíkjandi teimum broyttu møguleikunum at søkja í 2021, varð við lógarbroyting, sum fekk gildi í mai 2021 (løgtingsmál 100/2020), lagt upp fyri, at burturav nøgdini til vinnuligar royndir og verkætlanir kundi kvota eisini verða latin umsøkjarum til verkætlan, ið fevndi um ítøkiligt skipakeyp, har treyt ikki er um, at skipið skal hava veiðiloyvi. Henda broyting varð gjørd fyri at tryggja betri møguleika hjá nýggjum aktørum at fáa lut í kvotum.

Henda broyting í lóggávuni hevði síðani við sær einstakar broytingar í kunngerðini fyri vinnuligar royndir og verkætlanir fyri 2021 í mun til 2020, tí atlit mátti takast fyri hesum.

Til nr. 6.
Umsóknarumførini í 2020 og 2021 kunnu ikki heilt samanberast, tí at broytingar eru gjørdar í sjófeingislógini, soleiðis at tað nú ber til serstakt at søkja um kvotu til ítøkiligt skipakeyp.

Í 2021 eru tað feløg, ið hava fingið játtað kvotu til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum eisini vóru millum umsøkjararnar í 2020, men hvørs umsóknir ikki vórðu tilmæltar tá.

Jacob Vestergaard
landsstýrismaður